**Ítróttarblaðið**

# Anny Maria varð nummar sjey

## Anny Maria Davidsen, sum eisini róð fyri Team Danmark, var nummar sjey í bólkinum U23 í gjár

### Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


Uni Holm Johannesen

Anny Maria Davidsen rakk sjeynda plássinum í heimsmeistarakappingini í bólkinum U23 í gjárkvøldið. Hon kom á mál við tíðini 6:59.4. Føroyingar var gott og væl 18 sekund aftan fyri Kaisa Pajusalu úr Estland, sum vann kappingina.

Anny Maria Davidsen er fyrsta føroyska kvinnan, sum er komin niður um sjey minuttir, og undan kappingini varð væntað, at hon fór at røkka 10. plássinum. Hon segði við Sosialin fyri tveimum vikum síðan, at HM var ein stór avbjóðing.

- Tað eru sjálvandi altíð nervar upp á til eina slíka kapping, men hinvegin er kappingin størri, og eg verið tí meira pressa til eina HM-kapping, vísti hon á.

# Stórt úrslit fyri róðrarfelagið

## Ágrýtin, málrættaður, treiskur og ómetaliga raskur. Tað eru skoðsmálini, sum 17 ára gamli Sverri Svendberg Nielsen fær frá formanninum í Miðvágs Róðrarfelag

Uni Holm Johannesen

- Eg dugi ikki at siga, um vit høvdu væntað tað. Vit vónaðu tað besta, og vit eru heilt ótrúliga errin av honum.

Tað sigur Jógvan Hans Hansen, formaður í Miðvágs Róðrarfelag, har nýggi heimsmeistarin hevur fingið sína róðraruppaling. Lítla róðrarfelagið í Vágum hevur skapt karmarnar fyri venjingini, sum miðvingurin hevur fingið.

Formaðurin í Miðvágs Róðrarfelag greiðir frá, at Sverri Sandberg Nielsen fór at rógva fyri einum ári síðan. Tað vísti seg beinanvegin, at hann hevði neyðuga ágrýtni at gera seg galdandi. Evnini vóru betri enn hjá hinum, og hann hevur altíð verið sera málrættaður í síni venjing.

- Tað er sjálvsagt týdningarmikið fyri okkum, at vit eiga ein part av hesum heimsmeistaraheitinum. Vit hava lagt nógva orku í at fáa nøktandi venjingarumstøður til rógvarnar í felagnum, og tað hevur givið úrslit, sigur hann.

Formaðurin í Miðvágs Róðrarfelag brúkar lýsingarorðini ágrýtin, málrættaður, treiskur og ómetaliga raskur um nýggja heimsmeistaran.

### Okkara lyndi

Jógvan Hans Hansen heldur, at tað er innigrógvið í føroyingar at stríðast. Hann vísir á uppleggið hjá Sverra Sandberg Nielsen at byrja róliga og rógva við fullari megi móti endanum. Sinnislagið í føroyingum er at kroysta seg heilt út á markið.


*Mynd frá youtube.com. Myndin er frá Danmarksmeistaraskapinum*

Nakað, sum er nærmast ókent fyri rógvarar úr øðrum londum. Hinir rógvararnir í gjár róðu við javnari ferð allatíðina, meðan miðvingurin fór til stroks seinastu metrarnar.

- Tað er eisini ein fyrimunur at hava royndir frá føroysku kapproðrarbátunum. Føroyingar hava sín egna hátt at rógva í tungu føroysku kapproðrarbátunum, og tað samsvarar væl við at rógva inniróður, sigur Jógvan Hans Hansen.

# Føroyingar egna seg væl til inniróður

## Tað hevði sjálvandi verið stuttligari fyri føroyska rógving, um Sverri Sandberg Nielsen róð fyri Føroyar og føroyska rógving, men heimsmeistaraheitið hjá miðvinginum staðfestir, at føroyingar fara at eiga virkan leiklut í heimselituni í inniróðri næstu árini, heldur formaðurin í Róðrarsambandinum



Uni Holm Johannesen

Jan Herman Hansen, formaður í Róðrarsambandinum, er ovurfegin.

- Hetta hevur ótrúliga nógv at siga fyri føroyska rógving. Tað er sera týdningarmikið at hava fyrimyndir, sum røkka tindunum, er fyrsta viðmerkingin.

Sverri Sandberg Nielsen úr Miðvági fór frá øllum undir heimsmeistarakappingini í bólkinum 'Junior Men' í gjár. Undan kappingini hevði hann næstbestu tíðina í heiminum. Við eftir einum flottan endaspurt kom hann fyrstur á málið og kundi lata seg heiðra sum heimsmeistari.

- Tað eru slík úrslit sum kveikja altjóða áhuga fyri føroyskari rógving, vísir Jan Herman Hansen á.

### Róð fyri Danmark

Róðrarsambandið hevur sent fleiri rógvarar til kappingar uttanlands í inniróðri seinastu árini. Tað ábyrgdina hava ovastarnir í føroyskari rógving nú latið einstøku feløgunum. Feløgini hava raðfest hetta økið høgt í sínum fyrireikingum til kapproðrarárið, sum stendur fyri framman. Tí róð Sverri Sandberg Nielsen fyri Team Danmark í gjár.

Spell, heldur formaðurin í Róðrarsambandinum. Tað hevði sjálvsagt verið stuttligari um føroyska Merkið veittraði undir liðini á gullvinnaranum. Hóast tað, so er tað eitt stórt úrslit fyri føroyska rógving.

- Føroyingar eru væl egnaðir til inniróður. Tað minnir nógv um at rógva í føroysku kapproðrarbátunum, og tað er ein greiður fyrimunur at hava royndir frá føroysku bátunum. Føroyingar eru knáir í inniróðri, og eg ivist í, at vit eiga ein virknan leiklut í heimselituni í inniróðri næstu nógvu árini, sigur Jan Herman Hansen, sum leggur afturat, at fleiri føroyingar standa einki aftan fyri onnur lond.

### Teir fremstu

**Heili 180 luttakarar kappaðust um heimsmeistaraheitið í inniróðri í bólkinum 'Junior Men' í gjár.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Sverri Sandberg Nielsen | Team Denmark | 06:04.8 |
| 2. | Malte Johannes Walter Jakschik | Ruderverein Rauxel | 06:08.8 |
| 3. | Ryan O'Rourke | Crossfit Lehigt Valley | 06:13.8 |
| 4. | Joshua Weinstein | Salisbury Boat Club | 06:16.0 |
| 5. | Liam Casey | Saratoga Rowing Association | 06:17.9 |
| 6. | Buck Goggin | Choate Rosemary Hall | 06:18.8 |
| 7. | Craig Slater | Navesink River Rowing Club | 06:19.2 |
| 8. | Josh Fram | Lawrenceville School | 06:22.0 |
| 9. | Alexander Dillon | St. Augustine Prep HS | 06:22.1 |
| 10. | Kamin Vassilos | New Trier HS Rowing Club | 06:23.5 |
| 178. | Kyle McKay | C. Ringde and Latin School | 08:06.3 |
| 179. | Alex Coughlin | Mystic Valley Charter School | 08:14.8 |
| 180. | Elliot Skorupski | Middletown Higt School | 08:34.4 |